# STARVSLÆRUHANDBÓKIN

Læraraútbúgvingini

*2023/2024*

Námsvísindadeildin

Fróðskaparsetur Føroya

**INNIHALDSYVIRLIT**

1.0 Kunning til skúlastjórar og starvslæruvegleiðarar s. 3

2.0 Hvat er yvirskipaða endamálið við starvslæruni? s. 4

2.1 Hvussu er starvslæran skipað tey fýra útbúgvingarárini? s. 5

3.0 Hvussu bera vit okkum at, tá ið vit skaffa teimum lesandi starvslærupláss? s. 6

3.1 Nær byrjar og endar starvslæran undirvísingarárið 2022/23? s. 7

4.0 Hvør er uppgávan hjá starvslæruvegleiðaranum, áðrenn starvslæran byrjar? s. 7

4.1 Hvør er uppgávan hjá starvslæruvegleiðaranum, meðan tey lesandi eru í starvslæru? s. 8

4.2 Hvør er uppgávan hjá starvslæruvegleiðaranum, tá ið miðvegisvitjan er á skrá? s. 8

4.3 Hvør er uppgávan hjá starvslæruvegleiðaranum, tá ið starvslæran er av? s. 9

4.4 Hvør er uppgávan hjá starvslæruvegleiðaranum,
tá ið lesandi ikki standa mát í starvslæruni? s. 9

**Týdningarmiklir frymlar**

5.0 Skeiðslýsingin: Endamálið við starvslæruskeiðnum s. 10

5.1 Miðvegissamrøðan: Spurningar, ið kunnu takast upp s. 12

5.2 Eftirmetingarfrymilin: Samlað meting og góð ráð s. 13

5.3 Samsýning: Starvslæran hjá læraralesandi s. 15

5.4 Lønarseðilin: Soleiðis skal hann fyllast út s. 16

## 1.0 KUNNING TIL SKÚLASTJÓRAR OG STARVSVEGLEIÐARAR

Góða skúlaleiðsla og góðu stravslæruvegleiðarar

Fyrst av øllum fara vit at takk fyri, at tit er sinnað at taka læraralesandi á Námsvísindadeildini í starvslæru.

Tey, ið koma í starvslæru ganga á 1., 2., 3. og 4. árgangi.

Í hesi handbók gera vit tykkum kunnug við ymisk viðurskifti og ymiskar uppgávur, ið eru beinleiðis knýtt at starvslæruni.

Í hesi handbók kunnu tit m.a. kunna tykkum um

- hvat endamálið er við starvslæruni, og hvussu nógv hon fyllir frá ári til árs í læraraútbúgvingini
- tað samskiftið, ið skal vera millum Námsvísindadeildina og starvslæruvegleiðaran, áðrenn starvslæruna, í starvslærutíðarskeinum og eftir starvslæruna
- tey eftirmetingarskjøl og teir lønarseðlar, ið skulu handast, tá ið starvslæran er lokin.

Gevið gætur: Áðrenn starvslæruna fáa tit trý skjøl frá Námsvísindadeildini í einum og sama teldubrævi

- Starvslæruhondbókin, ið inniheldur allar neyðugar upplýsingar um starvslæruna (T.e. henda bókin)
- Eftirmetingarskjalið, ið skal sendast til Námsvísindadeildini í seinasta lagi 7 dagar eftir starvslæruna, og sum sigur frá, hvussu tann einstaki lesandi hevur staðið seg í starvslæruni, og hvørjar førleikar hann skal royna at styrkja komandi árið
- Lønarseðil til skúlastjóra og starvslæruvegleiðara, ið skulu fyllast út og sendast til Námsvísindadeildina beint eftir starvslæruna.

Tann teldupostadressan, ið vit nýta til starvslæruna, er nad-starvslaran@setur.fo**.**

Virðingarmest

Petur Lamhauge, starvslærusamskipari á læraraútbúgvingini (peturl@setur.fo

Frida Poulsen, útbúgvingarleiðari á læraraútbúgvingini (fridap@setur.fo)

## 2.0 HVAT ER YVIRSKIPAÐA ENDAMÁLIÐ VIÐ STARVSLÆRUNI?

1/9-2022 fingu vit eina nýggja Námsskipan fyri læraraútbúgvingina. Í hesi Námsskipan stendur

> [...] at endamálið við starvslæruni er at geva teimum lesandi møguleika at venja seg við læraraleiklutin og at loysa nógvar av teimum uppgávum, ið er samfastur partur av lærarastarvinum. Ein starvslæruvegleiðari er til staðar í undirvísingarhølinum, meðan undirvíst verður, og hann hevur til uppgávu at stuðla og vegleiða tí einstaka lesandi.

Høvuðsendamálið við starvslæruni er, at tey lesandi skulu venja sín

- floksleiðsluførleika
  - t.e. evnini at stýra einum flokki og at skipa eina undirvísingargongd
- relasjónsførleika
  - t.e. evnini at skapa eitt trygt undirvísingarumhvørvi og evnini at skapa góð og sterk bond við næmingar (og millum næmingar), ið hava ymiskar menningarfortreytir
- fakdidaktiska førleika
  - t.e. evnini at fremja eitt fakliga væl grundað og næmingalagað undirvísingartilboð í teimum lærugreinum, ið ein varðar av
- førleika at velja og/ella seta hóskandi undirvísingartilfar saman
  - her er bæði talan um tilfar í pappírsformi, i-bøkur og s-bøkur

Vit hava hesi 4 førleikaøkini sum mál og mið í øllum lærugreinum øll 4 lestrarárini. Førleikaøkini verða útgreinað í metingarfrymlinum (sí punkt 5.2.).

## 2.1 HVUSSU ER STARVSLÆRAN SKIPAÐ TEY FÝRA ÚTBÚGVINGARÁRINI?

Í nýggju Námsskipanini (2022) stendur soleiðis um starvslæruna:

Tey lesandi eru í starvslæru 4 ferðir í lestrartíðini

- 2. semestur – 5 vikur á 10 tímar = 50 tímar
- 4. semestur – 5 vikur á 10 tímar = 50 tímar
- 6. semestur – 5 vikur á 10 tímar = 50 tímar
- 8. semestur – 3 vikur á 10 tímar = 30 tímar
- Til samans = **180 tímar**

Tey lesandi fyrireika og eftirmeta hvønn einstakan undirvísingartíma væl og virðiliga. Hetta merkir, at arbeiðsbyrjan í starvslærutíðarskeiðnum er eins stór og í øðrum skeiðum (t.e. millum 37½ og 45 tímar um vikuna).

Umframt undirvísingartímarnar, ið eru nevndir omanfyri, so hava tey lesandi rætt til tveir ráðleggingartímar um vikuna. Ætlanin við hesum tímum er, at starvslæruvegleiðarin og tann lesandi kunnu taka faklig viðurskifti upp og tosa um, hvussu tað gongst tí lesandi í starvslæruni, og um hann hevur megnað at loyst tær uppgávur, ið eru tengdar at lærarastarvinum (sí punkt 4.2).

Tann lesandi kann eisini geva starvslæruvegleiðaranum afturboðan (feedback).

Tal av ráðleggingartímum tey fýra lestrarárini

- 2. semestur – 5 vikur = 10 tímar
- 4. semestur – 5 vikur = 10 tímar
- 6. semestur – 5 vikur = 10 tímar
- 8. semestur – 3 vikur = 6 tímar
- Til samans = **36 tímar**

Hesar leiðreglur eru galdandi fyri starvslæruna:

- Lesandi kunnu fara í starvslæru einsæris ella í bólki
  - Tað kunnu í mesta lagi vera trý lesandi í hvørjum bólki

- Hvør lesandi/bólkur er knýttur at einum ávísum starvslæruvegleiðara
  - Starvslæruvegleiðarin skal undirvísa í teimum grundlærugreinum (1. L) og tí linjulærugrein (2., 3. og 4. L), ið tann lesandi studerar í nevnda undirvísingarári, men lesandi kunnu eisini undirvísa í øðrum viðkomandi skúlafakum, ið starvslæruvegleiðarin varðar av

- Tá ið starvslærutíðarskeiðið er hálvrunnið, kemur akkersfólkið á Námsvísindadeildini á miðvegisvitjan, sum verður avtalað áðrenn.
    - Akkersfólkið eygleiðir ein undirvísingartíma
    - Eftir eygleiðingina tosa tey lesandi, akkersfólkið á Námsvísindadeildini og starvslæruvegleiðarin um, hvussu fyrsti partur av starvslæruni hevur hilnast
    - Í starvslæruhondbókini er ein frymil, ið vísir, hvørjar spurningar ein kann taka upp í miðvegissamrøðuni (sí punkt 5.1)

- Tá ið starvslæran er lokin, skal starvslæruvegleiðarin útfylla eitt eftirmetingarskjal, ið vísir, hvussu tann lesandi hevur staðið seg í starvslæruni
    - Starvslæruvegleiðarin gjøgnumgongur eftirmetingarskjalið saman við tí lesandi á seinasta ráðleggingartíma
    - Eftir starvslæruna sendir starvslæruvegleiðarin eftirmetingarskjalið til deildarskrivstovuna

## 3.0 HVUSSU FÁA LÆRARALESANDI EIN STARVSLÆRUSKÚLA?

Undirvísingarárið á Námsvísindadeildini byrjaði mánaðarskiftið aug./sep. Fyrst í oktober-mánaða fingu tey lesandi boð um at velja sær starvslærupláss.

Tað eru linjugreinalærararnir, ið kunna lesandi um starvslæruna, og sum syrgja fyri, at tey lesandi velja starvslæruskúla.

Læraralesandi kunnu sum útgangsstøði fara í starvslæru

- í Føroyum og uttanlands
- í miðstaðarøkinum og úti um landið

Útbúgvingarleiðslan mælir til, at starvslærur uttanlands í høvuðsheitum skulu lesast 2. ella 3. lestrarár

Tá ið lesandi velja sær starvslærupláss, skulu tey seta navn á tríggjar skúlar, ið hava teirra áhuga. Lesandi skulu ikki raðfesta skúlarnar.

Tey lesandi skulu somuleiðis upplýsa starvslærusamskiparanum

- navn á skúlastjóra
- telefonnummar hjá skúla og skúlastjóra
- teldupostadressu hjá skúla og skúlastjóra
- grund- og/ella linjulærugrein
- grunddeild, miðdeild ella hádeild.

Lesandi skulu ikki av sínum eintingum taka upp samband við ein skúla og/ella ein møguligan starvslæruvegleiðara. Tað er altíð starvslærusamskiparin á Námsvísindadeildini, sum tekur upp samband við skúlastjóran, og tað er skúlastjórin, ið vísir á skikkaðar starvslæruvegleiðarar á staðnum.

**Gevið gætur:** Undirvísingarárið 2022/2023 skipaði Námsvísindadeildin fyri einum stakskeiði í starvslæruvegleiðing og akkersfólkauppgávuni (15 ECTS). Teir lærarar, ið tóku hetta skeiðið, standa fremst í røðini, tá ið starvslæruvegleiðarar skulu finnast.

## 4.0 NÆR BYRJAR OG NÆR ENDAR STARVSLÆRAN Í 2023/24

Starvslæruskeiðið fyri lesandi í 1. L byrjar í viku 6 (t.e. mánadagin 7/2 – 2024) og endar í viku 10 (t.e. fríggjadagin 11. mars – 2024)
Starvslæran fevnir um

- 10 undirvísingartímar pr. viku
- 2 vegleiðingartímar pr. viku

2. L og 3. L byrjar í viku 5 (t.e. mánadagin 31/1 - 2024) og endar í viku 9 (t.e. fríggjadagin 4/3-2024).

Starvslæran fevnir um

- 10 undirvísingartímar pr. viku
- 2 vegleiðingartímar pr. viku

Starvslæruskeiðið fyri lesandi í 4. L byrjar í viku 5 (t.e. mánadagin 31/1-2024) og endar í viku 7 (t.e. fríggjadagin 18/2-2024).

Starvslæran fevnir um

- 10 undirvísingartímar pr. viku
- 2 vegleiðingartímar pr. viku

Gevið gætur:

Lesandi úr 2. L og 3. L kunnu vera í sama starvslærubólki.

Lesandi úr 4. L kunnu ikki vera í starvslærubólki saman við lesandi úr 2. og 3. L.

## 4.1 HVØR ER UPPGÁVAN HJÁ STARVSLÆRUVEGLEIÐARANUM, ÁÐRENN STARVSLÆRAN BYRJAR?

Tey lesandi fylgja einum og sama starvslæruvegleiðara gjøgnum alla starvslæruna. Hesin starvslæruvegleiðarin undirvísir í tí lærugrein, sum tey lesandi hava sum annaðhvørt grund- ella linjugreinalestur á læraraútbúgvingini – men hann undirvísir eisini í øðrum lærugreinum.

Tey lesandi skulu seta seg í samband við starvslæruvegleiðaran í seinasta lagi ein mánaða, áðrenn starvslæran byrjar.

- Tá ið starvslæruvegleiðarin og tann lesandi hava fingið samband, so er fyrsta uppgávan at seta eina tímatalvu saman, ið hóskar tí lesandi.
- Tann lesandi skal kanska undirvísa 4, 5 ella 6 tímar um vikuna í linjulærugreinini, og so skal starvslæruvegleiðarin finna írestandi tímarnar, soleiðis at starvslæran verður 10 tímar um vikuna.
- Um tann lesandi í einstøkum førum ikki kennir seg føran fyri at standa fyri at undirvísa í ávísari lærugrein og/ella ávísum evni, so kann hann eygleiða starvslæruvegleiðaran ella verða stuðulslærari

Aðrar uppgávur, ið starvslæruvegleiðarin skal taka sær av, áðrenn starvslæran byrjar eru:

- at kunna tann lesandi um flokkin og/ella flokkarnar, hann skal undirvísa
- at kunna tann lesandi um tey evni og tað tilfar, ið næmingarnir hava arbeitt við gjøgnum skúlaárið

Vit mæla til, at lesandi vitja skúlan og flokkin, áðrenn starvslæran byrjar. Hetta er tó ikki nakað krav frá okkara síðu.

## 4.2 HVØR ER UPPGÁVAN HJÁ STARVSLÆRUVEGLEIÐARANUM, MEÐAN TEY LESANDI ERU Í STARVSLÆRU?

Uppgávan hjá starvslæruvegleiðaranum er

- at kunna aðrar lærarar á skúlanum um, at skúlin fær lesandi í starvslæru
- at taka ímóti teimum lesandi og at vísa teimum runt á skúlanum
- at eygleiða tey lesandi gjøgnum starvslæruskeiðið
- at geva teimum konstruktivt feedback
- at seta tíð av til vegleiðingartímar og at tryggja, at hesir tímar snúgva seg um viðkomandi faklig, fakdidaktisk og almendidaktisk evni. T.d.
    - ársætlanir
    - lærubókaskipanir
    - ársmet
    - próvtalsgeving
    - próvtøkur
    - sernámsfrøðiligar avbjóðingar
    - undirvísingartilgongdir
    - foreldrasamstarv
    - flokslæraraleiklutin
    - heimaarbeiði o.a..
- at skapa eitt forum, har lesandi tora at undrast, hugleiða, ivast og at kjakast um sínar egnu førleikar at skipa fyri undirvísing

Um tað er møguligt, so skulu tey lesandi royna leiklutin sum garðvakt, at vera til morgunsang/morgunløtu, at taka lut í foreldrafundum og øðrum, ið er partur av skúlans virksemi.

Evni, ið verða tikin upp á ráðleggingarfundum, kunnu avtalast ein til tveir dagar áðrenn fundin. Men tað skal eisini verða rúm fyri, at ráðleggingarfundurin kann snúgva seg um viðurskifti (uppgávur, avbjóðingar, hendingar), ið taka seg upp frá degi til dags ella frá tíma til tíma.

## 4.3 HVØR ER UPPGÁVAN HJÁ STARVSLÆRUVEGLEIÐARANUM Á MIÐVEGISVITJANINI?

Miðvegis í starvslæruni kemur eitt akkersfólk av Námsvísindadeildini á starvslæruvitjan.

Akkersfólkið tekur upp samband við tey lesandi umleið 7 dagar áðrenn vitjanina.

Tey lesandi samskifta við starvslæruvegleiðarin og avtala, nær tað er hóskandi at seta vitjanina á skrá. Og tað eru tey lesandi, ið boða akkersfólkinum frá, nær og hvar viðkomandi skal møta.

Mannagongdin í sambandi við miðvegisvitjanina er henda:

- Akkersfólkið eygleiðir undirvísingina hjá teimum lesandi í 45 min.
- Beint aftaná eygleiðingina tosar akkersfólkið við tey lesandi og starvslæruvegleiðaran í 45 – 60 min.
- Henda samrøðan tekur útgangsstøði í einum miðvegisfrymli, ið er smíðaður til endamálið (sí punkt 5.1.)
- Tað er í stóran mun tey lesandi, sum saman við starvslæruvegleiðaranum, mynda samrøðuna.

## 4.4 HVØR ER UPPGÁVAN HJÁ STARVSLÆRUVEGLEIÐARANUM, TÁ IÐ STARVSLÆRAN ER AV?

Tá ið starvslæran er av, skal starvslæruvegleiðarin meta um, hvussu tann einstaki lesandi hevur staðið seg í starvslæruni og geva honum nøkur góð ráð við á leiðini.

Leiðslan á Námsvísindadeildini hevur smíðað ein eftirmetingarfrymil, ið útdýpar tey fýra førleikaøkini, ið tey lesandi sambært galdandi Námsskipan (2022) skulu menna í starvslæru-tíðarskeiðnum. T.e. floksleiðsluførleiki, relasjónsførleiki, fakdidaktiskur førleiki og førleikin at velja hóskandi undirvísingartilfar.

Eftirmetingarfrymilin er í tveimum pørtum

- Ein partur av hesum eftirmetingarfrymli er meinlíkur einum spurnarblaði, har ið starvslæruvegleiðarin fær ein spurning og skal meta um førleikarnar hjá tí lesandi við at seta ein kross í ein ávísan svarmøguleika

- Ein annar partur av hesum sama eftirmetingarfrymli er meiri opin, og har fær starvslæru-vegleiðarin høvi at geva tí lesandi nøkur orð og nøkur góð ráð við á vegnum

Í sambandi við sjálva eftirmetingina er hetta galdandi:

- Tá ið tú metir um undirvísingarførleikarnar hjá tí lesandi, so skalt tú taka støði í, hvussu leingi tann lesandi hevur lisið til lærara, og um hetta er 1., 2. 3. ella 4. ferð, at tann lesandi er í starvslæru.
    - Dømi I: “Hvussu væl megnaði tann lesandi at skapa arbeiðsró í flokkinum, tá ið hugsað verður um, at hetta er <u>fyrstu ferð</u>, at tann lesandi er í starvslæru”.
    - Dømi 2. “Hvussu væl megnaði tann lesandi at gera næmingarnar virknar í undirvísingini, tá ið hugsað verður um, at hetta er <u>fjórðu ferð</u>, at tann lesandi er í starvslæru”.
- Starvslæruvegleiðarin skal gjøgnumganga eftirmetingina saman við tí lesandi á seinasta ráðleggingartíma. T.e. at starvslæruvegleiðarin kann útgreina tað, ið hann hevur skrivað um hin lesandi, og tann lesandi kann seta spurningar

- Mælt verður til, at lesandi, ið skulu í starvslæru á øðrum, triðja ella fjórða sinni, nærlesa eftirmetingarfrymilin frá árinum fyri væl og virðiliga áðrenn starvslæruna og velja sær eitt, tvey ella trý førleikamál úr múgvuni, ið tey skulu royna at styrkja hesa ferð.
- Starvslæruvegleiðarin skal senda eftirmetingina til Námsvísindadeildina í seinasta lagi 7 dagar eftir starvslæruna. Hetta er teldupostadr. nad-starvslaran@setur.fo

## 4.5 HVØR ER UPPGÁVAN HJÁ STARVSLÆRUVEGLEIÐARANUM, TÁ IÐ LESANDI IKKI STANDA MÁT Í STARVSLÆRUNI?

Í Námsskipanini fyri læraraútbúgvingina (2022) stendur, at starvslæran er samfastur og kravdur partur av læraraútbúgvingini.

Læraralesandi skulu møta upp til ásetta tímatalið og ásettu ráðleggingartímarnar, tá ið starvslæra er á skránni.

Starvslæruvegleiðarin boðar frá, hvussu tann lesandi hevur møtt upp til ráðlagda undirvísing og onnur kravd tiltøk í starvslærutíðarskeiðinum. Um mett verður, at møtiskyldan er mishildin uttan haldgóða grund, verður avgerð tikin um, hvørjar avleiðingar hetta skal fáa. Talan kann í slíkum føri vera um, at tann lesandi skal

- taka írestandi partarnar av starvslæruni
- taka alla starvslæruna umaftur. - Hetta kann hava við sær, at starvslæran fyri viðkomandi tíðarskeið ikki verður góðkend.

Um so er, at starvslæruvegleiðarin metir, at ein læraralesandi hevur stórar avbjóðingar í starvslæruni og/ella hevur ein ivasaman atburð í flokshølinum, so skal hann seta seg í samband við útbúgvingarleiðsluna beinanvegin fyri at fáa eina samrøðu.

Henda samrøðan er í trúnaði.

## 5.0 SKEIÐSLÝSINGIN: Endamálið við starvslæruskeiðnum

Starvslæran í 1. L er knýtt at føroyskum á grund og støddfrøði á grund. Undirvísarar eru

- Støddfrøði á grund – skeiðsnummar 6804.22 (Ragna Ámundardóttir í Geil)
- Føroyskt á grund – skeiðsnummar 6754.22 (Rakul Skaale Andreasen)

Starvslæran í 1. L hevur ikki sína egnu skeiðslýsing

Í 2., 3. og 4. árgangi er starvslæran er partur av linjugreinalestrinum.

Endamálið og læruúrtøkurnar eru tær somu fyri linjulærugreininar í

- donskum sum undirvísingarfak – (Hanna Poulsen)
- føroyskt sum undirvísingarfak – (Páll Isholm)
- søga sum undirvísingarfak – (Oddur á Lakjuni)
- heimkunnleiki og list sum undirvísingarfak (Eyð B. Steinbjørnsdóttir)
- alis- og evnafrøði sum undirvísingarfak (Søren Antoft)
- ítrótt sum undirvísingarfak (Helgi W. Olsen)

| | |
|---|---|
| **Endamál**<br>*Purpose* | Endamálið við starvslæruni er at geva tí lesandi møguleika at venja seg við læraraleiklutin og at loysa nógvar av teimum uppgávum, ið eru samfastur partur av lærarastarvinum, og sum serliga eru knýttar at ávísa undirvísingarfakinum. |
| **Læruúrtøka**<br>*Learning outcomes* | Tá ið skeiðið er lokið, skal tann lesandi vera førur fyri at<br><br>• greiða frá, hvat næmingarnir skulu læra í (donskum, føroyskum, søgu, heimkunnleika og list, alis- og evnafrøði og ítrótt)<br>• leggja eina undirvísingarætlan til rættis, ið fevnir um millum 4 og 10 undirvísingartímar. Henda undirvísingarætlan skal taka støði í lærugreinini, men hon kann eisini vísa, hvussu viðkomandi lærugrein kann gerast partur av tvørgreinaligum arbeiði í fólkaskúlanum<br>• meta um, hvat undirvísingartilfar og hvørji undirvísingartól eru vælegnað í lærugreinini. Her eru bæði tilfar úr pappíri og elektroniskt tilfar íroknað<br>• taka støðu til, hvørjir undirvísingarhættir hóska væl í lærugreinini og meta um, hvussu ein kann undirvísingarlaga undirvísingina<br>• hugleiða um og vísa við dømum, hvørjar avbjóðingar ein lærari, ið undirvísir í lærugreinini kann møta<br>• meta um og skifta orð um sín egna relasjónsførleika, floksleiðsluførleika og fakdidaktiska førleika<br>• eftirmeta starvslæruna |

## 5.1 MIÐVEGISSAMRØÐAN: Spurningar, ið kunnu takast upp




**Gevið gætur:** Spurningarnir eru vegleiðandi. T.e. at allir spurningarnir nýtast ikki at fáa eins stórt uppmerksemi í miðvegissamrøðuni, og spurningar (ella ivamál), ið ikki verða nevnd omanfyri, kunnu saktans fáa umrøðu á fundinum.  Lesandi føra í stóran mun orðið, tá ið miðvegissamrøða er á skránni.

## 5.2 EFTIRMETINGARSKJALIÐ: Samlað meting og góð ráð

Hetta skjalið skalt tú útfylla og senda til Námsvísindadeildina beint eftir starvslæruna.

| | |
|---|---|
| Navn á lesandi (Dømi) | Jákup Hansen |
| Árgangur | 3. L |
| Linjulærugrein | Danskt |
| Tímatalva – t.e. lærugreinar og tímar pr. viku | Danskt (5 tímar), føroyskt (3 tímar) søga (2 tímar) |
| Skúli | Tofta skúla |
| Starvslæruvegleiðari | Per Person |
| Hvørji temu vóru tikin upp á ráðleggingarfundum | (1) Floksleiðsla, (2) heimaarbeiði, (3) at fáa arbeiðsró í flokkinuum, (4) at nýta samvirknu talvuna… |

| Hvussu hevur tann lesandi sum heild staðið seg í starvslæruni? |
|---|
| |

| Hvørjar førleikar skal tann lesandi serliga royna at menna komandi tíðina? |
|---|
| |

| Hvørji trý ítøkilig ráð kanst tú geva tí lesandi, nú starvslæran er av? |
|---|
| |

| | | Hvussu megnaði hin lesandi<br>*(setið x í teigin)* | Sera væl | | | | | | Als ikki |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | 7 | 6 | 5 | 4 | 3 | 2 | 1 |
| FLOKSLEIÐSLA | 1 | At skapa arbeiðsró í flokkinum | | | | | | | |
| | 2 | At fáa næmingarnar at lurta eftir sær | | | | | | | |
| | 3 | At seta undirvísingina í gongd | | | | | | | |
| | 4 | At skifta undirvísingaraktivitetir gjøgnum tíman | | | | | | | |
| | 5 | At taka saman um, tá ið tímin er lokin | | | | | | | |
| | 6 | At loysa ósemjur og/ella at fáa tamarhald á næmingum, ið órógva | | | | | | | |
| RELASJÓNIR | 7 | At skapa eitt gott huglag í flokkinum | | | | | | | |
| | 8 | At samskifta við næmingarnar | | | | | | | |
| | 9 | At fáa næmingarnar at samstarva | | | | | | | |
| | 10 | At gera undirvísingina meiningsfulla *(T.e. knýta undirvísingarevnið til gerandisdag og áhugamál næminganna og/ella til samfelagskjakið)* | | | | | | | |
| | 11 | At næmingalaga undirvísingina *(T.e. at leggja støðið og at royna at fáa allar næmingarnar við – eisini næmingar, ið hava serligar avbjóðingar og næmingar, ið hava annan etniskan uppruna)* | | | | | | | |
| FAKDIDAKTIKK | 12 | At velja hóskandi undirvísingartilfar | | | | | | | |
| | 13 | At velja hóskandi undirvísingarhættir | | | | | | | |
| | 14 | At greiða frá og at vísa dømi | | | | | | | |
| | 15 | At gera næmingarnar virknar í undirvísingini | | | | | | | |
| | 16 | At nýta talvuna | | | | | | | |
| | 17 | At nýta e-bøkur og s-bøkur | | | | | | | |
| | 18 | Hvussu fakliga stinnur var tann lesandi í tí linjulærugrein, ið hann undirvísti í | | | | | | | |
| SAMANUMTØKA | 19 | Hvussu var tann lesandi fyrireikaður, tá ið hann kom til undirvísing | | | | | | | |
| | 20 | Hvussu dugdi tann lesandi at samstarva við teg sum starvslæruvegleiðara og við onnur lesandi og/ella aðrar lærarar | | | | | | | |
| | 21 | Hvussu megnaði tann lesandi at tosa kvalifiserað um lærarayrkið, tá ið ráðleggingartímar vóru á skránni. *(T.e. at nýta fakligar termar og at vísa til tað, ið hann hevur lisið um og arbeitt við á NÁD o.a.)* | | | | | | | |
| | 22 | Samanumtøka: Hvussu hevur tann lesandi megnað hesa starvslæruna | | | | | | | |

## 5.3 SAMSÝNING: Starvslæran hjá læraralesandi

Hesir eru takstirnir:

- Starvslæruvegleiðarin fær 116,85 kr,- fyri hvønn undirvísingartíma
    - Eru tvey lesandi í bólki, so verður upphæddin tvífaldað
    - Eru trý lesandi í bólki, so verður upphæddin trífaldað

- Starvslæruvegleiðarin fær 212,45 kr,- fyri hvønn ráðleggingartíma.
    - Upphæddin er tann sama, líkamikið um lesandi eru í bólki ella einsæris
    - Tá ið tvey og/ella trý lesandi eru í bólki er vanligt, at allir bólkalimirnir eru saman í ráðleggingartímanum. Men hetta er ikki nakað krav

- Skúlaleiðslan fær 6,37 kr,- fyri hvønn starvslærutíma og hvønn vegleiðingartíma pr. lesandi.

**Samsýning til samans:**

1., 2. og 3. árslesandi

| | 50 undirvísingartímar pr lesandi | 10 vegleiðingartímar pr bólk | Tilsamans | Leiðsla: Samsýning |
|---|---|---|---|---|
| 1 lesandi | 5842,50 kr,- | 2124,50 kr,- | 7967,00 kr, | 382 kr |
| 2 lesandi | 11.685 kr,- | 2124,50 kr,- | 13.809,50 kr,- | 700 kr |
| 3 lesandi | 17.527,50 kr,- | 2124,50 kr,- | 19652,00 kr,- | 1.019 kr |

4. árslesandi

| | 30 undirvísingartímar pr lesnadi | 6 vegleiðingartímar pr bólk | Til samans | Leiðsla: Samsýning |
|---|---|---|---|---|
| 1 lesandi | 3.505,50 kr,- | 1.274,70 kr,- | 4.780,20 kr,- | 229 kr |
| 2 lesandi | 7.011,00 kr,- | 1.274,70 kr,- | 8.285,70 kr,- | 420 kr |
| 3 lesandi | 10.516,50 kr,- | 1.274,70 kr,- | 11.791,20 kr,- | 611 kr |

**5.4 LØNARSEÐILIN: Soleiðis skal hann fyllast út** **DØMI – ein lesandi (50 tímar)**

# Lønarseðil fyri starvslæruna hjá læraralesandi 2023/2024

| | |
|---|---|
| Í tíðini: | 31/01-2024 til 04/03-2024 |
| hevur lesandi<br><br>lestrarnummar: | Silja Olsen – 2022.144 |
| Luttikið í hesum: | 50 undirvísingartímum og 10 vegleiðingartímum |
| Skeiðsheiti: | xxxx.xx Alis- og evnafrøði – Starvslæra |
| Akkersfólk á NÁD: | Søren Antoft |
| Skúli: | |
| Teldupostur/tlf: | |
| Skúlaleiðari: | |
| P-tal: | |
| Kontonr. og banki: | |
| Eftirlønarkonto: | Betri: ☐ Lív: ☐ Annað: |

** Sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag fær skúlaleiðarin kr. 6,37 fyri hvønn lisnan tíma.*

| | |
|---|---|
| Starvslæruvegleiðari: | |
| P-tal: | |
| Kontonr.: | |
| Eftirlønarkonto: | |

** Sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag verður starvslæran samsýnd soleiðis:*
*Undirvísingartímar: Tímaløn á stigi 29.2 falda við 0,55 fyri hvønn praktikktíma fyri hvønn lesandi (kr. 116,85) og*
*Samtalutímar: Tímaløn á stigi 29.2 falda við 1,00* ***fyri hvønn bólk*** *(kr. 212,45)*

__________________________________

*Dagfesting og undirskrift (leiðari)*

***Gevið gætur***: Skúlin skal senda eitt eftirmetingarblað pr. lesandi, saman við hesum skjalinum. Eftirmetingarblaðið og samsýningarskjalið skulu sendast til nad-starvslaran@setur.fo í seinasta lagi eina viku eftir, at starvslæran er lokin. *(Skjølini skulu sendast sum PDF ella skannast í teldu (ikki við telefon/mynd)*

# Lønarseðil fyri starvslæruna hjá læraralesandi 2023/2024

| | |
|---|---|
| Í tíðini: | 31/01-2024 til 04/03-2024 |
| hevur lesandi<br>lestrarnummar: | Silja Olsen – 2022.144,<br>Rannvá Jakobsen – 2022.131 |
| Luttikið í hesum: | 100 undirvísingartímum og 10 vegleiðingartímum |
| Skeiðsheiti: | Føroyskt á linju III – Starvslæra |
| Akkersfólk á NÁD: | Páll Isholm |
| Skúli: | |
| Teldupostur/tlf: | |
| Skúlaleiðari: | |
| P-tal: | |
| Kontonr. og banki: | |
| Eftirlønarkonto: | Betri: ☐ Lív: ☐ Annað: |

** Sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag fær skúlaleiðarin kr. 6,37 fyri hvønn lisnan tíma.*

| | |
|---|---|
| Starvslæruvegleiðari: | |
| P-tal: | |
| Kontonr.: | |
| Eftirlønarkonto: | |

** Sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag verður starvslæran samsýnd soleiðis: Undirvísingartímar: Tímaløn á stigi 29.2 falda við 0,55 fyri hvønn praktikktíma fyri hvønn lesandi (kr. 116,85) og Samtalutímar: Tímaløn á stigi 29.2 falda við 1,00* ***fyri hvønn bólk*** *(kr. 212,45)*

______________________________

*Dagfesting og undirskrift (leiðari)*

***Gevið gætur****:* Skúlin skal senda eitt eftirmetingarblað pr. lesandi, saman við hesum skjalinum. Eftirmetingarblaðið og samsýningarskjalið skulu sendast til nad-starvslaran@setur.fo í seinasta lagi eina viku eftir, at starvslæran er lokin. *(Skjølini skulu sendast sum PDF ella skannast í teldu (ikki við telefon/mynd)*

## 5.4 LØNARSEÐILIN: Soleiðis skal hann fyllast út DØMI – trý lesandi (50+50+50 tímar)

# Lønarseðil fyri starvslæruna hjá læraralesandi 2023/2024

| | |
|---|---|
| Í tíðini: | 31/01-2024 til 04/03-2024 |
| hevur lesandi<br>lestrarnummar: | Silja Joensen – 2022.144, Rannvá Jakobsen – 2022.131, Alda Dam – 2022.102 |
| Luttikið í hesum: | 150 undirvísingartímum og 10 vegleiðingartímum |
| Skeiðsheiti: | Føroyskt á linju III – Starvslæra |
| Akkersfólk á NÁD: | Páll Isholm |
| Skúli: | |
| Teldupostur/tlf: | |
| Skúlaleiðari: | |
| P-tal: | |
| Kontonr. og banki: | |
| Eftirlønarkonto: | Betri: ☐ Lív: ☐ Annað: |

** Sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag fær skúlaleiðarin kr. 6,37 fyri hvønn lisnan tíma.*

| | |
|---|---|
| Starvslæruvegleiðari: | |
| P-tal: | |
| Kontonr.: | |
| Eftirlønarkonto: | |

** Sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag verður starvslæran samsýnd soleiðis:*
*Undirvísingartímar: Tímaløn á stigi 29.2 falda við 0,55 fyri hvønn praktikktíma fyri hvønn lesandi (kr. 116,85) og*
*Samtalutímar: Tímaløn á stigi 29.2 falda við 1,00 **fyri hvønn bólk** (kr. 212,45)*

________________________________

*Dagfesting og undirskrift (leiðari)*

***Gevið gætur**: Skúlin skal senda eitt eftirmetingarblað pr. lesandi, saman við hesum skjalinum. Eftirmetingarblaðið og samsýningarskjalið skulu sendast til nad-starvslaran@setur.fo í seinasta lagi eina viku eftir, at starvslæran er lokin. *(Skjølini skulu sendast sum PDF ella skannast í teldu (ikki við telefon/mynd)*